Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 26.09.2023
Mál nr.: 23/18453
Málsviðgjørt: JEK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
§ 2. Persónur, ið er undir fullari skattskyldu sambært reglunum í § 1, stk. 1, nr. 1-5 í skattalógini, og hevur **fast tilhald í Føroyum**, kann fyri hvørt barnið, ið hann hevur foreldramyndugleikan yvir, draga frá í útroknaða landsskattinum ein barnafrádrátt á kr. 9.200, um barnið er undir 7 ár 1. januar í tí álmanakkaári, sum skattsetingin viðvíkur, og ein barnafrádrátt á kr. 6.500, um barnið er millum 7 og 17 ár 1. januar í tí álmanakkaári, sum skattsetingin viðvíkur.	Í § 2, stk. 1, 1. pkt. verður aftan á "tilhald í Føroyum" sett: "ella hevur tilhald uttanlands sum sendifólk".
§ 3, stk. 4 *Stk. 4.* Hvør persónur, sum fær fólkapensjón, sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a., fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt og í útroknaða kommunuskattinum ein kommunuskattafrádrátt. Landsskattafrádrátturin er upp til 3.000 kr. um árið, og kommunuskattafrádrátturin er upp til 3.000 kr. um árið.	§ 3, stk. 4 verður orðað soleiðis: "*Stk. 4.* Hvør persónur, sum fær fólkapensjón, sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a., fær í útroknaða landsskattinum ein frádrátt á upp til 6.000 kr. um árið."